# ottir sexlívið




*Saman við Føroya Felag Móti Krabbameini arbeiða Lív Lognberg og Elin Vitalis, sjúkrarøktarfrøðingar og Karen Heinesen, sosialráðgevi, við at svarpa ljós á krabbamein og seksualitet*

## Tabu – eisini millum heilsustarvsfólk

Tey flestu, sum fáa staðfest krabbamein, hugsa fyrst og fremst um útlitini fyri at gerast frísk, men ein nýggj donsk kanning vísir, at fyri tey allarflestu verður spurningurin um, hvussu sjúkan og viðgerðin fer at ávirka seksualitetin eisini rættiliga átrokandi:

- 80 % av krabbameinssjúklingunum siga seg ynskja kunning um, hvussu sjúkan og viðgerðin kann ávirka teirra sexlív
- 50 % tora ikki at spyrja, um ikki starvsfólkini sjálvi taka stig til at tosa um evnið

Samstundis vísir kanningin, at:

- 50 % av heilsustarvsfólkunun vanta vitan um, hvussu sjúkan ella viðgerðin kann ávirka sexlívið
- 22 % hava ongantíð tosað við sjúklingar um evni, sum hava tilknýti til seksualitet
- 43 % nevna smædni, sømiligheit og tabu sum forðingar

## Smittar krabbamein?

Tað finnast enn nógvar misskiljingar í sambandi við krabbamein, og hesar hava serliga lyndi til at gera vart við seg, tá talan er um krabbamein og seksualitet. Tí er tað umráðandi at sláa fast, at:

- Krabbamein smittar ikki gjøgnum samlegu. Ein krabbakykna kann ikki liva víðari í kroppinum hjá einum øðrum menniskja.
- Ein, ið fær stráluviðger, førir ikki geislavirkni víðari gjøgnum samlegu, hvørki meðan hann er í viðgerð ella aftaná.
- Kropsvæta inniheldur bert evarska smáar leivdir av kemoviðgerð. Vandi fyri smittu er sera lítil, men einstakir læknar ráða til at nýta hít fyrstu 14 dagarnar eftir viðgerð.

hava sum heild ikki nóg gott innlit í evnið og mangla ofta dirvið til at taka spurningin upp saman við sjúklinginum, sigur Lív Lognberg.

Júst hetta var ein av aðaltáttunum á krabbameinsráðstevnuni í Oslo í heyst. Í hesum sambandinum segði Haakon Aars, yvirlækni, millum annað

– Allir krabbameinssjúklingar eiga at hava krav uppá samrøður um, hvussu sjúkan fer at ávirka teirra sexlív. Hóast starvsfólk innan heilsuverkið eisini eru ávirkaði av galdandi morali og normum, eiga tey at megna at endurskoða sín egna hugburð fyri at kunna arbeiða við menniskjum, sum kanska hugsa øðrvísi, enn tey sjálvi.

Vantandi samskifti millum sjúkling og heilsustarvsfólk hevur ikki bara við sær, at sjúklingurin ofta kennir seg sera einsamallan við trupulleikunum. Tíverri hendir tað eisini, at sjúklingar ikki verða nóg væl kunnaðir um avleiðingarnar av eini skurðviðgerð til at kunna taka eina væl umhugsaða avgerð. Dømi eru um eitt nú mannfólk, sum hava latið seg skurðviðgjørt uttan at vita, at teir kundu gerast impotentir av tí. Lívsgóðska kann vera so ymisk frá menniskja til menniskja, og tí eiga starvsfólk innan heilsuverkið eisini at hýsa tankanum um, at ein krabbameinssjúklingur møguliga heldur vil liva í vónini enn at váða at missa sínar seksuellu førleikar.

### Hvat er sex?

Ein spurningur, sum eyðvita trongir seg á í hesum viðfangi er, hví sex er so týdningarmikið. Nógvir sjúklingar eru eisini í fyrsta umfari so takksamir fyri at hava yvirlivað sjúkuna, at spurningar sum tengja seg at sexlívinum fáa dám av at vera luksustrupulleikar. Hetta kann sjálvsagt eisini vera ein av orsøkunum til, at sjúklingar ofta aftra seg við at orða trupulleikan við onnur.

– Tað ber neyvan til at definera, hvat sex er fyri nakað. Men í øllum førum er tað ein liður í tí at vera menniskja og í flestu førum eisini ein týdningarmikil liður í nærleikanum millum tvey menniskju, sum hava valt at liva saman. Sex er ein máti, menniskju játta hvønn annan uppá, og fyri nógv er sex tætt tengt at mátanum, tey vísa sín kærleika. Onkusvegna er seksualiteturin tískil altíð ein virðismikli partur av lívinum hjá tí einstaka, og tí má hann vera ein nátúrligur liður í rehabiliteringarbeiðinum, tá tann sjúkurakti skal fóta sær av nýggjum, sigur Karen Heinesen, sosialráðgevi hjá Føroya Felag Móti Krabbameini.

Arbeiðið hjá felagnum móti krabbameini miðar í hesum sambandi móti, at sjúkan ikki kemur at gera av, hvørt tað eydnast sjúklinginum at hava eitt nøktandi sexlív. Hetta krevur samstundis, at tann sjúkurakti er opin fyri teimum broytingum, sum kunnu gerast neyðugar - tað verið seg at brúka hjálpitól, nýggjar samlegustøður ella kanska heilt nýggjar mátar at vera saman uppá. Tí krevur nýggja støðan ikki minst, at bæði starvsfólk og sjúklingar rista av sær gamlar ímyndir um, hvat er "normalt", og hvat ikki er.

> *"Onkuntíð havi eg sagt við mannin hjá mær: Kundi tú ikki bara farið út og funnið tær eina aðra og fingið tað yvirstaðið og so komið heimaftur. Tað hevði passað mær fínt, tí so slapp eg undan."*
>
> Charlotte 35 ár, "I lyst og nød"